# Atlantic Airways 21 ár og sterkari enn nakrantíð




**Tann 28. mars 2009 eru 21 ár liðin, síðan Atlantic Airways fleyg sín fyrsta túr millum Vágar og Keypmannahavn. Tá hevði føroyska flogfelagið eitt flogfar, fleyg til eittans ferðamál og hevði færri enn 30 fólk í starvi. Nú hevur Atlantic Airways sjey flogfør, flýgur í summartíðini til 10 ferðamál og hevur 270 fólk í starvi. Við Atlantic Airways er seinastu 21 árini skapt ein sjálvstøðug føroysk flogvinna, og felagið hevur ikki verið sterkari enn nú**

TÍÐINDASKRIV

Mong ristu við høvdinum, og onnur væntaðu sær lítið, tá landsstýrismaðurin við flogmálum, Lasse Klein, í 1987 óvæntað boðaði frá, at landsstýrið hevði tikið stig til at stovna eitt alment føroyskt flogfelag. Flogfelagið var stovnað í samstarvi við Cimber Air, og ætlanin var, at tað skuldi taka kappingina upp við Mærsk Air á rutuni millum Føroyar og Danmark.

Long tíð gekk ikki, fyrr enn ætlanin hjá landsstýrinum var sett í verk. Tann 28. mars í 1988 kundi eitt hvítt flogfar við navninum Atlantic Airways seta kós úr Vágum ímóti Keypmannahavn. Eitt nýtt tjóðarflogfelag var farið til verka við einum flogfari, knøppum 30 starvsfólkum og støð uttanlands, tí tá var ongin hangarur í Vágum at seta flogfør í.

Føroyingar tóku beinanvegin væl ímóti Atlantic Airways, men tað var ikki nøkur løtt uppgáva at loysa felagið úr lagdi. Raksturin gav hall fyrstu árini, og tá búskaparkreppan í Føroyum av álvara fór at gera um seg í 1992, var eginognin hjá felagnum horvin. Cimber Air var tá farið úr felagnum, og landsstýrið mátti tí einsamalt taka um endan.

Loysnin gjørdist, at landsstýrið teknaði 75 milliónir krónur í nýggjum partapeningi. Tey ringastu kreppuárini eydnaðist ikki at fáa Atlantic Airways at geva avlop, men gongdin skuldi sum fráleið venda, og í 1995 hevði felagið á fyrsta sinni avlop á rakstrinum.

## Virksemið økist

Í 1995 varð virksemið eisini víðkað til at umfata flúgving til Íslands. Atlantic Airways átók sær at standa fyri hesi flúgving í samstarvi við Air Iceland. Árini eftir gekk tað skjótt hjá Atlantic Airways. Felagið fór at flúgva millum Ísland og Grønland og fleiri leigutúrar úr Keypmannahavn til Bosnia. Og í 1998 gjørdi felagið av at leiga eitt flogfar aftrat.

Við tveimum flogførum bar til at víðka flúgvingina uppaftur meira. Fyrst varð túratalið millum Føroyar og Danmark økt. Í 1998 fór felagið at flúgva til Skotlands og í 1999 eisini til Noregs. Víðkaða flúgvingin fekk stóra undirtøku millum manna, og felagið fekk tí tørv á eini varandi loysn fyri flogfør. Farið varð til samráðingar um keyp av nýggjum flogfari í oktober 1999. Sáttmáli varð undirskrivaður í november, og 2. februar í 2000 stóð næsta flogfarið av slagnum British Aerospace 146-200 í Vágum.

Síðan hevur Atlantic Airways víðkað nógv um talið á flogførum og fráferðum. Í dag eru sjey flogfør og tríggjar tyrlur í flotanum. Í háárstíðini hevur felagið 60 fráferðir um vikuna og flýgur til 10 ymiskar evropeiskar býir, teirra millum Keypmannahavn, Reykjavík, London og Billund. Haraftrat stendur Atlantic Airways fyri allari ferðafólkaflúgving innanoyggja og leiti- og bjargingararbeiði við tyrlum kring Føroyar.

## Sterkt felag

Síðan byrjanina í 1988 hevur Atlantic Airways staðið fyri at útbúgva nógvar føroyingar at virka í flogvinnu, bæði flogskiparar, flogternur og mekanikarar. Við Atlantic Airways hava Føroyar tí ikki bara fingið betri flogsamband við umheimin. Føroyar hava eisini bygt upp eina sjálvstøðuga føroyska flogvinnu, ið hevur økt munandi um førleikarnar hjá føroyingum á hesum øki.

Atlantic Airways varð í 2007 skrásett á íslendska virðisbrævamarknaðinum, tá landsstýrið einskildi ein triðing av felagnum. Seinni er felagið eisini skrásett á keypsskálanum í Keypmannahavn. Sum børsskrásett felag er felagið nú regulerað eftir greiðum reglum um fráboðanarskyldu, innanvitan og røkt av íleggjarum. Í dag eiga landsstýrið og 1330 privatir partaeigarar felagið.

Fíggjarliga er Atlantic Airways sera væl fyri. Felagið hevur havt avlop á rakstrinum seinastu 14 árini, og avlopini hava økt nógv um eginognina, sum nú er 220 mió. kr. Umsetningurin er 550 mió. kr. og solvensurin oman fyri 50 prosent. Felagið skapar árliga eitt útflutningsvirði á umleið 250 mió. kr., og gjaldførið hjá felagnum er 82 mió. kr. Partabrævið hjá Atlantic Airways var besta skrásetta norðurlendska flogpartabrævið í 2008.

Atlantic Airways brynjar seg støðugt til framtíðina, og í sambandi við ætlanirnar at endurnýggja flotan undirskrivaði felagið í 2008 keypsavtalu við flogverksmiðjuna Airbus um at keypa eitt A 319-flogfar, ið ætlandi verður látið felagnum í 2011. Felagið væntar, at tá hetta flogfarið er sett í rakstur, og flogvøllurin er longdur, er føroysk flogferðsla munnadi nútímansgjørd.


ÚTBJÓÐING

## Umvæling av Brúnni um Streymin

Við hesum verður arbeiðið at umvæla brúgvardekkið á Brúnni um Streymin boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- umvæling av betongdekkinum og fuktbjálving

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðnum frá apríl 2009 til mánaðarskifti sep./okt. 2010. Sunnara koyribreyt verður umvæld í 2009, norðara koyribreyt í 2010.

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn

**mánadagin, 20. apríl 2009 kl. 14.00.**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá mánadegnum 30. mars 2009 við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi á kr. 2.000, sum verða at flyta á konto nr. 134.228.4 í Eik Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*




Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

**Stuðul verður latin til verkætlanir sum:**
- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku – og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul, telefon 30 20 10.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2009 og skulu sendast til:

**Tórshavnar kommuna**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32
110 Tórshavnar kommuna

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 4. til 10. mai 2009.

Tórshavnar kommuna